

*Tony Blair, 30 ára gamal, eftir valsigurin í Sedgefield, sum bar hann inn í Parlamentið*

inum um tað sonevndu grein IV ("Clause IV) í reglugerðini hjá Labour. Í greinini, sum er frá 1918, var tilskilað, at flokkurin bant seg til at virka fyri, at framleiðsla og onnur vinna vóru felagsogn hjá fólkinum. Greinin hevði, sum staðfesting av reinum sosialistiskum politikki, alstóran prinsipiellan týdning.

Tá ið Tony Blair í 1994 varð valdur til nýggjan formann í Labour, fór hann at virka fyri, at grein IV bleiv avtikin. Eftir hart stríð, har stívrendir vinstramenn sum Arthur Scargill bardust við hond og fót ímóti hesi broyting, kom málið til atkvøðugreiðslu á floksins ráðstevnu tann 29. apríl 1995. Blair vann atkvøðugreiðsluna við einum meiriluta upp á 65%.

### Hamurin sum søluvøra

Aftan fyri hesar broytingar lógu bæði ein hugmyndafrøðilig skrá og ein medvitin valstrategisk ætlan. Hvat innihaldi viðvíkti, var ætlanin at evna til eina triðju leið - eina sigling onkustaðni mitt ímillum siðbundnan vinstrapolitikk og nútíðar marknaðarbúskap, millum samfelagsliga umsorgan og liberalismu. Hvat valstrategi viðvíkti, var endamálið at bróta inn í hagan hjá Teimum Konservativu, koma á tal við - ikki bara tann vanliga Labour-veljaran - men fólk úr miðalstættunum, sum vanliga valdu konservativt ella liberalt.

Sambært rannsóknunum hjá Mandelson, Brown og Blair var Labour undir Margaret Thatcher rikið í ein tronga. Flokkurin slapp ikki út úr aftur hesum typpi, og útlit vóru til, at hann ongantíð aftur fór at fáa ein meiriluta. Tann nýggi politikkurin skuldi - miðvíst, treiskliga og vísiliga bygdur upp - gera enda á hesi oyðimarkargongd. Neyðugt var, fyri at fáa veljararnar, partar av vinnulívinum og teir sterku fjølmiðlarnar í sín part, at ofra nøkur heilag prinsipp.

Umframt innihald og strategi løgdu teir tríggir musketerarnir stóran dent á stíl, borðreiðing, fasadu, skræðu. Tá ið fólk sum Anji Hunter, Alastair Campbell og flogvitið Philip Gould vórðu knýtt at Blair sum ráðgevar, gjørdist hetta stílkonseptið til eitt slag av vitskapi. Kannað varð, við spurnarbløðum, samrøðum osfr. eftir, hvørji slagorð, hvørjar keipur, hvat slag av brosum talaðu til ta - hagfrøðiliga sæð - breiðastu fjøldina. Var tað nóg mikið bara at vera brosandi og fagurlátin, ella skuldu kanska aðrir "bollar í suppuna", eitt nú álvarsemi, fastleiki ella vreiði?

### Aladdin og Nureddin

Hesar og aðrar rannsóknir og nýhugsanir gjørdust støðið undir tí tilgongd, sum endaði sum New Labour. Tann nýggi arbeiðaraflokkurin bleiv skaptur sum ein frukt, lutvís av (í ein ávísan mun) ráksnúnari hugmyndafrøðiligari skáksigling, lutvís av reklamuvísindum og vakurleikagransking.

Av teimum trimum garpunum, sum gingu á odda í hesum frambroti, var Gordon Brown tann elsti og royndasti. Hann hevði røtur í arbeiðaraflokkinum, hevði hugmyndafrøðiliga vitan, var rithøvundur og hevði akademiska útbúgving (hann skrivaði doktararitgerð um tann skotska arbeiðaraflokkin). Men fyrst og fremst skaraði hann framúr í búskaparligum innliti. Tað var tí semja millum teir tríggjar, at - skuldi teirra ætlan eydnast - var Brown favorittur til at gerast floksleiðari og, seinni, forsætisráðharri.

### Blair verður formaður

Men so við og við broyttist myndin. Sum Blair las, lærdi, fekk álitisstørv í Labour og royndi sítt flog, vaks hansara sjálvsálit. Onnur - bæði í Labour og uttanfloks - varnaðust henda tungufima, kurteisliga og vituga mannin. Vinir og ráðgevarar hildu, at eingin orsøk var til, at Blair varð standandi í øðrum rað. Tá ið so John Smith (sum hevði tikið við í 1992 sum formaður í Labour, tá ið Neil Kinnock tók seg aftur) brádliga andaðist í mai 1994, skeyt Tony Blair seg sjálvan upp sum formansevni - og varð valdur.

Spælið var vunnið. Blair hevði, heldur ómakaleyst, trivið um róðrið, meðan Brown - tann seinføri, men meira royndi, arbeiðssami og dugnaligi - stóð brúnasíður og hugdi at, og helst kendi seg snýttan. Vinskapurin millum teir báðar lagsbrøðurnar var fokin. Men samstarvið mátti halda fram.

Annar partur av hesi greinarøð fer mest at snúgva seg um samstarvið við Bush og bardagan móti Saddam Hussein, Blairs størstu politisku avbjóðing. Fyribils ber til at staðfesta, at Tony Blair, við konservativum pápa og ongum tilknýti til Labour, er *uttanstrokið* - ella, sum eisini verður sagt: avtseitarin - sum blæsur nýggja, og øðrvísi snaraða, megi í tann bretska arbeiðaraflokkin.




*Blair á ársfundi hjá teimum bretsku fakfeløgunum. Sum skugga-arbeiðsmálaráðharri loysti Blair í 1989 Labour-flokkin frá yrkisfeløgunum*